# Tingskipanin skal endurskoðast

**Formansskapurin fer at viðgera setan av grein 25 nevnd, sum skal endurskoða tingskipanina. Tá ið sipað verður til grein 25, meinast við tingið kann sambært seta eina nevnd at geva tilmæli í ávísum málum.**

Í Grein 25 stendur soleiðis:

- § 25. Løgtingið kann seta aðrar løgtingsnevndir enn tær, sum nevndar eru í § 24, at geva løgtinginum tilmæli í ávísum málum. Hesar nevndir sita bara, til nevndin hevur avgreitt setning sín og í ongum føri longri enn, til tingsetan endar.

Stk. 2. Nevndir, sum settar verða sbrt. stýrisskipanarlógini § 19, sita, til tær hava avgreitt setning sín tó ikki longur enn til, at løgtingsval hevur verið Edmund Joensen, løgtingsformaður, sigur, at arbeiðið hjá nevndini verður at gera eina natúrliga dagføring av tingskipanini, sum tíðin krevur. Edmund vil tó ikki siga nakað ítøkiligt um, hvat nevndin fer at arbeiða við:

- Formansskapurin hevur sjálvandi eitt boð uppá tað, men allir flokkarnir skulu koma til orðana. Vanligt er, at nevndin er mannað við umboði úr hvørjum flokki umframt løgtingsformannin.

Edmund Joensen hevur ikki nakað boð uppá, nær nevndin skal vera liðug við sítt arbeiði at gera eina langtíðardagføring av tingskipanini.



*Edmund Joensen vil ikki siga ítøkiliga hvørjar broytingar grein 25 nevndin skal gera á tingskipanina. - Talan verður um eina langtíðardagføring, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður.*

# Løgreglan - okkurt smávegis á ovastevnu

**Ovastevna hevur verið hetta vikuskiftið, og har var okkurt harðskapsmál hjá løgregluni at taka sær av. Báturin Randi úr Fuglafirði varð tikin fyri at fiska við ov smáum meskum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Okkurt smávegis harðskapsmál var á ovastevnu. Talan var um onkran lúsing, sum ikki hevði so nógv uppá seg.

Fríggjanáttina klokkan 3 varð ein drongur sligin niður og sparkaður av einum 18 ára gomlum dreingi. Drongurin fekk skaða í eygað. Málið verður nú reist móti tí 18 ára gamla.

### Innbrot

Tvey innbrot vóru í vikuskiftinum. Annað var framt í einum húsum í Niels Finsensgøtu, har ein maður hevði tikið 500 krónur. Tjóvurin stongdi mannin, sum átti húsuni inni, men hann slapp út aftur.

Hitt innbrotið varð framt á Avhaldshúsið í Nólsoy. Tjóvurin hevur tikið ein pengakassa, har 600 krónur vóru í. Løgreglan kannar nú innbrotini.

Ein maður varð innilæstur, tá ið bummarnir við Eiðisvatn fóru aftur. Hann slapp tó út aftur, tá ið fólk komu at opna teir.

### Ov smáar meskar

Nakrir heimleysir vórðu sæddir við nøkrum ølkaggum, og illgruni var um, at teir høvdu tikið teir. Eitt vitni hevur greitt løgregluni frá, at hon sá tveir menn koma gangandi út gjøgnum bakdyrnar á Manhattan við ølkagga. Teir verða nú ákærdir fyri stuldur.

Batúrin Randi úr Fuglafirði var í dag tikin av Brimli fyri at hava fiskað við ov smáum meskum. Bótin á 20.000 varð góðtikin.

# Vilja ikki siga nakað ítøkiligt um bilverju í Leirvík

**Jón Kragesteen frá Ráðnum Fyri Ferðslutrygd og Oyvindur Brimnes vilja ikki siga nakað ítøkiligt um óhappið í Leirvík, tí at teir vita einki um tað.**

**- Bilverjur skulu setast upp, har tað er neyðugt, sigur Jón**

FERÐSLUTRYGD
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Foreldrini at førarinum, sum var við í ferðslóhappinum í Leirvík leygardagin, hava kært til Sosialin um, at eingin bilverja er fyri vegin millum Statoil-støðina og kirkjuna í Leirvík. Tey siga, at aðrir bilar eru eisini rendir útav har. Um veturin hendir tað, at bilar glíða av vegnum í hálkuni, tí at har er eingin bilverja fyri.

Jón Kragesteen visti einki um ferðsluóhappið í Leirvík, tá ið Sosialurin ringdi til hann fyrrapartin í dag.

### Mest møguligar bilverjur

- Vit hava eina standard formulering, sum sigur, at bilverja skal vera har, sum tað er neyðugt. Eg fái ikki úttala meg um akkurát hetta málið, tí at eg veit ikki nóg mikið um tað. Men um, tað passar, at fleiri bilar eru koyrdir omanav har, so burdu bilverjur heilt vist verið gjørdar har. Sum heild halda vit, at tað skal vera mest møgulig bilverja á øllum vegum kring landið, sigur Jón.

Vegurin í Leirvík er á markinum millum landsveg og bygdaveg. Oyvindur Brimnes er stjóri í Landsverk, og hann hevur heldur ikki hoyrt nakað um óhappið.

- Eg fái ikki sagt nakað um hatta, tí at eg kenni ov lítið til tað. Eg veit ikki, um hatta er landsvegur. N‡ggjur vegur verður nú gjørdur, og tá verður alt landsvegur. tann vegurin verður gjørdur við ferðslutrygdini í hásæti, og tá verðður bilverjur gjørdar, sigur Oyvindur.



*Á myndini sæst, hvussu langt oman í fjøruna í Leirvík bilurin fór. Tað er eingin bilverja fyri vegin millum statoil-støðina og kirkjuna.*

*Mynd: Emily á Reynatrøð*